# Spara 66% av Sev rokningini til ljós

**STÓR SPARING** Síðani vit skiftu perurnar út, hava vit spart tveir triðingar av Sev rokningini til ljós, sigur Kartni Jacobsen, sløkkiliðsstjóri í Havn

Áki Bertholdsen

- Okkara royndir eru, at vit hava spart eini 66% av útreiðslunum til ljós.

Kartni Jacobsen, sløkkiliðsstjóri í Havn, staðfestir, at tað hevur loyst seg í ólukkumát hjá teimum at skifta vanligu ljósini á Sløkkistøðini út við orkusparandi ljós.

Í Sosialinum mánadagin staðfesti Karl A. Olsen, borgarstjóri í Vestmanna, at tað ber væl til hjá kommunum at spara eini 50% av Sev rokningini til ljós.

- Vit brúka alt ov nógva orku til ljós, tí vit hava so gamla tøkni og bara við at leggja um til meiri orkusparandi ljós, ber væl til at spara eina helvt av orkunýtsluni.

Hann sigur, at Sev er undir hørðum trýsti fyri at byggja út fyri at nøkta orkutørvin.

- Men leggja vit um til meiri orkusparandi tøkni, ber til at minka orkutørvin munandi. Tað lættir eisini nógv um trýstið á Sev um at byggja út og tað er eisini ein stór sparing.

### Spara tveir triðingar

Ein almennur stovnur, sum kann taka undir við hesum, er Sløkkistøðin í Havn.

- Vit høvdu frætt um orkusparandi ljós frá Ledfo og settu okkum fyri at gera nakrar royndir við teimum, sigur hann.



*- Við nýggju ljósunum er orkunýtslan til ljós á Sløkkistøðini í Havn bara ein triðing av tí, hon var frammanundan, sigur stjóri*

- Í hesum sambandi skiftu tey øll ljósini í verkstaðnum, sum hoyrir til Sløkkistøðina, og settu orkusparandi ljós í ístaðin.

Í sjálvadi Sløkkistøðini hava tey eisini skift ljósini í onkrum rúmi og sett orkusparandi ljós í.

Hann sigur, at tey hava eisini sett orkusparandi ljós upp á plássinum uttanfyri støðina, har tey vaska bilar og fáast við annað.

- Har verður ofta arbeitt í myrkri og fyri at fáa nóg gott arbeiðsljós, høvdu vit tveir ljóskastarar, sum tilsamans vóru 3000 ella 4000 watt.

- Nú hava vit sett orkusparand ljós upp, sum ikki brúka meiri enn 90 watt. So tað er ein øgiliga stór sparing at vera farin frá eini nýtslu upp á 3000 ella 4000 watt, niður á eina nýtslu upp á 90 watt, sigur Kartni Jacobsen.

Hann sigur, at áðrenn tey skiftu ljósini, mátaðu tey streymnýtsluna.

Og nú, tey hava sett orkusparandi ljós í, hava tey aftur mátað nýtsluna

- Tað vísir seg, at orkunýtslan er minkað heilar tveir triðingar, sigur Kartni Jacobsen.

- Við hesum nýggju ljósunum brúka vit sostatt bara ein triðing av teirri orku, vit brúktu frammanundan til ljós, sigur sløkkiliðsstjórin.

### Halda longri

Hann leggur afturat, at hesi nýggju ljósini eru minst líka góð, sum tey gomlu.

- Vit hava eisini fingið at vita, at hesi nýggju orkusparandi ljósini halda nógvar ferðir longri enn tey vanligu.

Tað er ein stórur fyrimunur fyri teir, tí tað er høgt til loftið hjá teimum og tí er tað fyritøka at skifta ljós so ofta, sum teir eru vanir.

- Skulu vit hereftir bara skifta ljós tíggjunda hvørt ár ístaðin fyri at skifta hvørt ár, sum vit eru vanir við teimum gomlu ljósunum, er tað eisini ein stór sparing.

Hann sigur, at ein annar stórur fyrimunur við hesum nýggju ljósunum er, at tey tendrað alt fyri eitt, har tey gomlu ljósini tendra so líðandi og har tað gongur ein løta, áðrenn tey lýsa við fullari styrki.

Kartni Jacobsen sigur, at enn eru hesi nýggju ljósini so nýggj, at tey vita ikki reiðiliga enn um tey halda alt tað, sum seljarin hevur lovað.

Men hann staðfestir, at í sløkkiliðnum eru teir so mikið væl nøgdir við tey nýggju ljósini, at tey ætla at gera fleiri royndir við teimum og sjálvur væntar hann, at hetta verður framtíðin á Sløkkistøðini.

**Útreiðslurnar til ljós eru minkaðar tveir triðingar, samstundis sum at nýggju ljósini halda 10 ferðir leingi, sum tey gomlu**

## 1,2 TONS

Ein síðuvinningur av at skifta til orkusparandi ljós, er, at Co2 útlátið minkar munandi.

Leif Mohr, sum umboðar Ledfo ljósini í Føroyum, hevur gjørt eina leyðsliga útrokning fyri Miðlahúsið, sum vísur, at fekk ein lutfalsliga lítil fyritøka sum Miðlahúsið sær Ledfo Ljós, hevði streymnýtslan farið niður í helvt og at Co2 útlátið hevði minkað 1,2 tons.

---

**Onkrar fyritøkur hava spart yvir 90%**

# SPARA 95%

**ORKUSPARING** Í nógvum førum tekur tað bara nakrar fáar mánaðir at spara íløguna í orkusparandi ljós, aftur

Áki Bertholdsen

- Í nógvum førum eru tað bara nakrir mánaðir at spara íløgurnar inn aftur.

Tróndur Djurhuus er nevndarformaður í Ledfo, sum eru farnir at gera orkusparandi ljós til vinnulív á sjógvi og landi og til privatbrúk.

Talan er ikki um vanligu spariperurnar, sum fáast í handlunum.

Talan er um dioduljós, sum eru gjørd í USA, fyri tað mesta og sett saman í Kina.

Í hesum sambandi hevur Ledfo havt tætt samstarv við fiskiskip og almennar myndugleikar á landi um at menna ljós, sum spara nógva orku, men sum eisini skulu tola veður og vind, sjórok og rull og sum sostatt skulu halda nógvar ferðir longri enn vanlig ljós.

- Endamálið er at byggja upp eina føroyska vinnu, har vitanin og menningin er í Føroyum, men har ljósini verða gjørd uttanlands.

Tróndur Djurhuus sigur, at higartil hava royndirnar verið sera góðar.

- Serliga umborð á fiskiskipum hava ljósini roynst væl, tí tey hava víst seg at halda nógvar ferðir longri enn ljósini, tey eru von við, samstundis sum at talan er um nógv betri ljós.

Men nevndarformaðurin staðfestir, at tað er ikki bara haldførið, sum teir hava lagt seg eftir, tí endamálið er eisini at spara.

Higartil eru royndirnar, at verða tey nýggj Ledfo ljósin sett í ístaðin fyri tey gomlu ljósini, er orkusparingin eini 50%-60%.

Samstundis telur tað so eisini við, at hesi ljósini halda 10 -12 ferðir so leingi, sum vanlig ljós.

- At tú sleppur undan at kostnaðinum og arbeiðnum at skifta ljós so ofta, er eisini ein stór sparing.

Men Tróndur Djurhuus sigur, at tey hava eisini royndir av, at alifyritøkur hava havt eina orkusparing upp á yvir 95%.

Talan var um alivirki, sum tók eina stóra og dýra ljóskipan upp á 1000 watt burtur og setti eina skipan upp, sum lýsti minst líka væl, ella enntá betri, men sum bara var 50 watt.

Síðani hevur orkunýtslan bara verið 5% av tí, hon var frammanundan.

Hann hevur eisini dømi um stór virki, sum krevja nógv ljós, har tey hava sett Ledfo ljós upp.

- Tey eru samd um talan er um eitt nógv betri arbeiðsljós, men hesi nýggju ljósini brúka so lítið av streymi, at tey hava kuta 93% av streymrokningini til ljós.

Tróndur Djurhuus sigur, at er talan um virki, stovnar, kommunur, ella onnur, sum brúka rættiliga nógv ljós, verður íløgan at skifta til Ledfo ljós, spard aftur upp á nakrar mánaðir.